

# Lættari at seta krøv tá oljan er funnin

**UMBOÐAN** Eru vit í tí støðu, at olja er funnin, og feløgini sera fegin vilja sleppa til Føroya at arbeiða, er nógv lættari at seta størri krøv sigur Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi.

Jan Müller

Nú nýggj oljufeløg so sum bretska Dana Petroleum og japanska Cieco eru vorðin partur av føroysku oljuleitingini hava vit sæð, at hesi feløg júst á sama hátt sum onnur feløg eru vorðin skrásett í Føroyum og hava fingið føroyskar advokatar at umboða seg. Vit hava spurt stjóran á Jarðfeingi, Petur Joensen, um tað er rætt at lata advokatskrivstovur umboða oljufeløgini heldur enn at lata hetta upp til føroyingar, sum ynskja at førleikamenna seg innan vinnuna og vera virkandi partur av framtíðar oljuvinnuni?

– Hatta er ein spurningur, sum hevur verið uppi at venda av og á - hvat man skal krevja av oljufeløgunum um, hvussu tey skulu verða umboðað í Føroyum. Tá oljufeløgini koma til Føroya at arbeiða eru tey skipað í samtøkum, og har er tað vanliga soleiðis, at hvørt samtak hevur eitt fyristøðufelag. Tað stendur so fyri øllum tí praktiska arbeiðinum, meðan hini eru partnarnar og eru meira ella minni aktiv.

Á Jarðfeingi fyrihalda vit okkum til fyristøðufeløgini, sum gera tað stóra arbeiðið sigur stjórin og heldur fram:

– Tey eru væl og virðiliga umboðað her av virknum fólki, og um so partnararnir eisini skuldu verið umboðaðir av øðrum enn av advokatum – og hví teir ikki eru líka góðir sum onnur veit eg ikki - hava vit so ikki kent nakran tørv at sera krøv um. Tey feløgini hava ikki so nógv virksemi. Orsøkin til at tú yvirhøvur hevur tað kravið, at tey í minsta lagi skulu hava eina deild í Føroyum, er tann, minnist meg rætt, at tað vóru skattamyndugleikarnir her, sum kravdu, at tey skuldu vera fysiskt umboðað her í landinum. Sum oljumyndugleiki hava vit ikki so nógv samband við tey feløgini, sum ikki eru fyristøðufeløg.

### Velja »med omhu«

– Men átti tað ikki at verið eitt krav frá føroyskum myndugleikum til tey feløg, sum ynskja at gera íløgur her, at tey vórðu meira sjónlig eitt nú við eini skrivstovu, soleiðis at føroyingar høvdu møguleika at seta seg í samband við hesi feløgini. Nú hevur nærum eingin nakran kunnleika til feløg, sum fegin vilja gera íløgur í Føroyum.

– Eg rokni við, at vit kundu valt frítt slag at sett øll tey krøv, sum vit høvdu hug til, so tað er væl møguligt, at vit áttu at hugsað tann vegin. Men vit mugu nú einaferð minnast til, at vit eru ikki í tí støðu, at vit kunnu seta krøv, sum okkum lystir. Tí haldi eg vit eiga at velja tey "med omhu", hvat vilja vit. Tað vit hava gjørt higartil er at fáa feløgini at brúka sum mest orku uppá sjálva leitingina, tí tað er hon, sum skal føra okkum víðari, so leitingin verður gjørd væl og virðiliga.

### Heldur fáar treytir

Petur Joensen sigur seg minnast, at ein ráðgevi einaferð gav teimum tey ráð, tá skattatreytirnar skuldu skrúvast saman, at tað er ikki bara spurningurin um, hvussu nógvan skatt vit taka, men eisini hvussu mong amboð vit brúka so sum skatt, royalty ol. Fleiri treytir ørkymla feløgini og verða altíð mettar sum ein byrða, og onkunstaðni koppar tað yvir.

– Skal tað skiljast sum at tað er munur at seta treytir, áðrenn oljan er funnin og so aftaná?

– Ja tað er tað so heilt víst. Tí, eru vit í tí støðu, at olja er funnin, og feløgini sera fegin vilja sleppa til Føroya at arbeiða, so eru støðan ein heilt onnur. Tað sóu vit eisini í Noregi, at tá oljan var funnin og feløgini vórðu gramm at koma inn, tá kann man sum seljari veruliga hava fatur á tí langa endanum og selja.

*jan@sosialurin.fo*



STJÓRI

*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi*

**» Tað vit hava gjørt higartil er at fáa feløgini at brúka sum mest orku uppá sjálva leitingina, tí tað er tað, sum skal føra okkum víðari - at leitingin verður gjørd væl og virðiliga.**

**» Tað ræður um at lofta oljufeløgunum, meðan áhugin er har. Tí um hann er í dag, er ikki vist, at hann er har í morgin.**

ikki nýtist at fara heilt frá nýggjum. Tað varð gjørt, tí tað vórðu ymsar meiningar um, hvussu áhugavert tað var ella ikki. So møguleikin er har.

*jan@sosialurin.fo*